# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/06 - 2. desembur 2021 16:00-18:00

### Skrá:

1.Skúlabygnaðurin
2. Fyrstahjálparskeið til starvsfólk
3. Foreldraumboðsfundurin
4. Felags foreldrafund: Nær, Hvat og Hvør?
5. Ymiskt
6. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Ruth, Bjørg, Sjúrður, Derhard & Erla |
| Forfall: | Snorri |
| Gestir: | Eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**Skúlabygnaður**
Bygnaðurin er vendur aftur í kommununa.

| Var settur at vera: | Er í løtuni: |
|---|---|
| I | II |
| 3 sporaður forskúla til 6.fl | 3 sporaður forskúla til 7.fl |
| 4 sporaður í hádeild við næmingum av Velbastað | 5(6)sporaður í 8.-9.fl við næmingum frá SFS |
| Serflokkar til hvørja deild | Eingir serflokkar |

Væntast at verða I

Ad.2
**Fyrstahjálparskeið til starvsfólk**
Brot úr samskifti:
Vit vilja fegin skipa fyri einum fyrstuhjálparskeiði fyri starvsfólki í Skúlanum á Fløtum. Hvussu leingi tað tekur, kemur ann uppá, hvat fyri skeið tit ynskja. Mest vanligt eru 4-tíma, 7-tíma og 12-tíma skeiðini.
**Fyrstuhjálparskeið ísv. hjartasteðg (4 tímar)**
Á hesum skeiðinum lærir tú millum annað:

- Hjarta-lunga-bjarging
- Brúk av AED (hjartastartara)
- Tey fýra høvuðspunktini

- Burturbeining av fremmandalikami

Hetta skeiðið verður tikið í einum. Kostnaður fyri hetta skeiðið hevði verið 450 fyri hvønn luttakara. Ella 4 tímar vikarløn + grundgjald á 800 kr. + bókling (75 kr. per luttakara).

**Víðkað skeið í fyrstuhjálp (12 tímar)**

Hetta er eitt umfevnandi skeið, har tað millum annað verður komið inn á:

- Fyrstahjálp, fet fyri fet, tá talan er um hjartasteðg, við og uttan AED (hjartastartara).
- Fyrstahjálp, tá talan er um størri vanlukkur í ferðsluni, á arbeiðsplássinum, við hús og tá talan er um brádliga íkomna sjúku og skaðar.
- Handfara el-vanlukkur, fremmandalikam í andaleiðini, skálding, brunasár, brot á armar og bein, skaðar á nakka/rygg og høvd
- Meta um persónar, senda boð eftir hjálp á 1-1-2, leggja í legu, og sálarlig fyrstahjálp.

Allir 12 tímarnir nýtast ikki at vera tiknir í einum. Skeiðið verður sum oftast deilt upp í tveir ella tríggjar dagar.

Kostnaður fyri hetta skeiðið hevði antin verið ein prísur per luttakara, sum eitur 675 per luttakara. Ella kann skúlin velja at gjalda 12 tímar vikarløn til instruktørin – tá kemur eisini eitt grundgjald á 1.500 kr. og kostnaður fyri bøkur (150 kr. per luttakara) og venjingartilfar (30 kr. per luttakara) afturat.

**Innihaldið á einum 7-tíma skeiði kann snikkast til.** Kostnaður fyri hetta hevði verið 500 fyri hvønn luttakara. Ella 7 tímar vikarløn + grundgjald á 1.000 kr. + kostnað fyri bøkur (150 kr. per luttakara) og venjingartilfar (30 kr. per luttakara).

Ynskja tit at halda skeiðið í arbeiðstíð ella eftir arbeiðstíð?

Lat meg bara frætta, hvat tit ynskja.

...

Hey Regin,

Eg havi nú fingið svar frá fyrstuhjálparinstruktørinum, og tað *ber* til 13/12 og 15/12.

Tað vil siga, at vit kunnu bjóða tykkum tvey skeið í desember:

Hold 1: 6/12 og 13/12

Hold 2: 13/12 og 15/12

So kann restin koma í januar/februar. Gott at fáa tað sett á skrá sum skjótast, fyri at tryggja at undirvísarar eru ledigir.

Ber tað til at vera í hølum hjá tykkum? Tí tveir instruktørar skulu undirvísa 13/12, so mugu tey hava tvey hølir.

Einmælt samtykt.

Ad.3

**Foreldraumboðsfundurin**

Skúlaárið 19/20 varð hildin fyrstu ferð. 20/21 varð avlýst av Korona. 21/22 er sett í bíðistøðu. Foreldraumboðini ynskja at halda fundin í februar. Fuglaskálin ella háslættin er tøkur til endamálið. Skrivstovna veitir kaffi og søtt. Fólk vóru glað fyri fundin og foreldaumboðini ynskja at halda fram og gera hetta til afturvendandi mannagongd og tiltak.

Ad.4

**Felags foreldrafund: Nær, Hvat og Hvør?**
Leggja fyri foreldraráðið hvat evnið skal vera og nær fundurin møguliga skal vera. Men millum jól og páskir.

Ad.5
**Ymiskt**
a. Ítróttarsamstarv við HB og B36 og møgulig námsferð til DK í mars
b.
c.

Ad.6
**Áseta næsta fund**
Uppskot
17. februar 2022, 16-18